# Skeiv lýsing hjá REX

Av misgáum varð skeiv lýsing hjá REX sett í blaðið í gjár

Lýsingin, har lýst varð við ókeypis atgongumerki til REX, er ikki galdandi

**Vit biðja lesarar okkara um umbering!**

Sosialurin



## Góðu tjóðveldisveljarar!

Eg takki tykkum øllum, bæði tykkum sum vóru nóg djørv at seta krossin við meg, og øllum sum valdu Tjóðveldi inn á oddan enn einaferð.
Eg takki fyri gott samstarv millum øll valevni og tykkum, sum fyriskipaðu og samskipaðu.
Tað hevur verið læruríkt at luttaka í einum valstríði, har eingin kendi spælireglurnar til fullnar, tí landið júst er blivið eitt valdømi. Kappingin var sostatt hørð fyri okkum nýggju og ókendu, men stuttleikin gjørdi, at eg í hvussu er við góðum treysti fór víðari til næstu uppgávu. Serliga stuttligt var at syngja kareoke saman við yngstu valevnunum, Tjóðhild og Rógva. Vit vóru best!
Eitt sum harmar meg er, at eitt valstríð er eitt pengaorgii, har tú brúkar alt ov nógvar pengar uppá at lýsa teg sjálva. Eg vildi, at vit fóru aftur til at hugsa um umhvørvi og felagsstev í einum komandi valstríði, heldur enn at renna eftur lýsingarfyritøkum, sum gera, at ein atkvøða kann koma at kosta rættiliga nógvar krónur. Tað er jú boðskapin og ikki persónarnar vit skulu selja. Hetta er ikki ein dystur fyri stakar uppihaldarar og onnur við miðalinntøkum.
Tillukku til tykkum, sum manna og kvinna tingbólkin. Góða eydnu til tykkum, eg havi fullt álit á, at tykkara partur ikki kemur at liggja eftur.
Góða eydnu til tykkum, sum ikki rukku inn hesuferð, men sum hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri føroyskt fullveldi og fyri at lýsa Føroyar sum eitt tolið land.

**Góða eydnu til øll okkum, sum ongan veg rukku hesu ferð. :-)**

Maud Wang Hansen



TJÓÐVELDI



# MÓTTØKA

Í sambandi við at **HANS PETUR JOENSEN** hevur 40 ára starvsdag hjá P/F Valdemar Lützen



Bjóða vit til móttøku í handlinum á Skálatrøð
**fríggjadagin 1. februar 2008**
**frá kl. 15.00 til 17.00**

**P/F Valdemar Lützen**

Tlf. 30 10 20 · Fax 30 10 21 · vlb@vlb.fo